

## Meltingarvegurin komin út

Nú er onnur fløgan eftir Garasjuguð, Meltingarvegurin, útkomin.Á Meltingarvegnum er tónleikur settur til 18 yrkingar úr 8 ymiskum yrkingasøvnum hjá Tóroddi Poulsen sum eisini hevur staðið fyri løgunum. Eins og á fyrru fløgunum, sum eitur ”Rock Against Færøkitsch” og varð útgivin á vári í 2008, er talan um nakað av psykedeliskum kirkjupunki og óvaskaðum bluesrocki, men eisini meiri stillar framførslur við klaverpoetiskum undirspæli. Meltingarvegurin er innspældur í upptøkuhølunum hjá Kaj Klein og hann hevur eisini staðið fyri upptøkuni, ljóðblandi og spælir millum annað ukulele og synthesizer. Garasjuguð sjálvur spælir guitar, sálmareiðhjól, klaver og eigur sjálvandi røddina. Navnframi Palle Hjorth, sum vit kenna úr Savage Rose og bólkinum hjá Peter Sommer spælir hammond, klaver og harmoniku og eitt sindur av synthesizer eisini. Joachim Ussing spælir bass eins og hann hevur gjørt tað fyri Lone Kellerman, Jomfru Ane Band og Niels Skousen.Trummuspælarin eitur Peter Dombernowski og hann spælir annars við heimskenda Howe Gelb í bólki hansara Giant Sand. Og Elin J. Smith syngur kór. Plátufelagið Tutl er útgevari av Meltingarvegnum.

# Feldthaus tendra



**Kennir tú typuna? Danski lívsstílsserfrøðingurin Kristina Feldthaus ger í øllum førum. Bæði typuna, sum hugsar umhvørvi niður í hvønn plastikkposa, og hina, sum hevur fult bluss á hitanum og reyðgløðandi málara allan sjónarringin**

**UMHVØRVI**

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Semja er um at veðurlagið broytist: oyðimørkin veksur, vatnstøðan hækkar og týttari verður millum stormarnir, sum eisini verða ógvusligari.

Hetta eru broytingar, sum ávirka alt livandi á jørð, so tað verður óliviligari hjá flest øllum skapningum. Eisni menniskjunum.

Men so røkkur semjan heldur ikki longur.

Tí hví broytist veðurlagið?

Eru broytingarnar mannaskaptar ella natúrligar?

Sambært 2500 veðurlagsserfrøðingum frá klimapanelinum hjá ST er orsøkin, at vit menniskju lata alt í verðini ov nógv veðurlagsgass út í himmalrúmið.

Á hinum bógnum hava vit tey, sum vilja vera við, at broytingarnar eru natúrligar, og at vit hvørki skulu ella kunnu steðga teimum.

- Men ímynda tær, at teir 2500 serfrøðingarnir hava rætt. At vit kunnu minka um veðurlagsbroytingarnar við at leggja vanarnar eitt sindur um. Við ikki at vera so gramm og slúkin og átufrek, sum hesi seinastu mongu árini, har vit fullkomiliga uttan fyrilit hava tikið frá náttúruni uttan at bera nakað aftur!